LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Runavíkar Kommuna

Tórshavn, tann 15. august 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/10394-27
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 23/00688

# Álit
um vantandi svar frá Runavíkar kommunu uppá umsókn um byggiloyvi

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um drúgva málsviðgerðartíð og vantandi kunning frá Runavíkar kommunu í sambandi við eina umsókn um byggiloyvi til neyst. Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna, hóast álvarsliga átalu í september 2022, enn í juni 2023 ikki hevði viðgjørt umsókn klagarans um byggiloyvi til neyst, og at Runavíkar kommuna í slíkari støðu ikki gjørdi meira fyri at kunna klagaran um støðuna við máli hansara, og nær avgerð kundi væntast. Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommunu eina sera álvarsliga átalu fyri hetta og sendi samsvarandi umboðsmanslógini § 10 fráboðan um málið til Løgtingið, løgmann og landsstýrismannin í kommunumálum.*

## 2. Málslýsing

Tann 7. mai 2023 fekk umboðsmaðurin eina klagu frá A um vantandi svar og kunning frá Runavíkar kommunu viðvíkjandi umsókn hansara um byggiloyvi til neyst, sum hann lat inn í mars 2021.

Klagan var soljóðandi:

> “ Eg fari hervið aftur at klaga yvir málið um umsókn um byggiloyvi til eina neystagrund, sum eg ikki fái svar uppá frá Runavíkar kommunu. Eg veit ikki hvat sker. Eg fari hervið at biðja um hjálp aftur. Eg veit ikki, hvat eg skal gera. Er eingin myndugleiki yvir Runavíkar kommunu, sum kann greiða málið og sum kann hjálpa mær, og sum kann yvirtaka málið....”

Klagan viðvíkur sama máli, sum áður er klagað um tvær ferðir til Løgtingsins umboðsmann. Fyrru ferð varð málið viðgjørt í álitinum LUM 22/08550, dagfest 19. september 2022, har álvarslig átala varð givin Runavíkar kommunu fyri handfaringina av umsóknunum um byggiloyvi til neyst. Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna hevði lagt umsóknina frá klagaranum og hinar umsóknirnar um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu og ikki viðgjørt tær sambært galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð.

Av tí at umboðsmaðurin helt talan vera um, at álvarslig mistøk vóru framd í málinum, varð kunning um málið send formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í Kommunumálum, sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini.

Tann 3. januar 2023 sendi klagarin aftur eina klagu um málið, um at hann einki hevði hoyrt frá Runavíkar kommunu, hóast hann hevði sent áminning um málið tann 1. desember 2022.
Í skrivið, dagfest 7. februar 2023, sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "Viðv.:Byggimálsviðgerð í sambandi við neyst
> Vísandi til skriv tykkara í sambandi við klagu frá A og endurskoðan av byggimálsviðgerð í sambandi við umsóknir um byggiloyvi til neyst.
>
> Ætlandi skulu allar umsóknir um byggiloyvi til neyst v.m., sum liggja í bíðistøðu, verða viðgjørdar og helst avgreiddar á viðkomandi nevndarfundum, sum verða í viku 7 og viku 12.
>
> Býráðið hevur í eina tíð havt ynski um at fáa greiðari reglur í samband við bygging av neystum, serliga við atliti til, at flestu neyst í dag verða innrættað sum frítíðarbústaður heldur enn sum neyst til at goyma bátar í. Tí mega øll viðurskifti í hesum sambandi vera í lagi, m.a. brunaviðurskifti, kloakkviðurskifti, drekkivatnsviðurskifti, atkomuviðurskifti v.m., sum eisini víst til í: "Vegleiðandi skriv frá Løgmálaráðnum nr. 8001 dagf. 18. mars 2008 um krøv til byggsamtyktir og øki til frítíðarhús". Verulig gongd er sett á hetta mál, og væntandi verður komið á mál einaferð í vár."

Tann 13. februar 2023 sendi Runavíkar kommuna hesa kunning til klagaran:

> "Vísandi til rykkjara tín dagf. 1/12-2022, har biðið verður um svar uppá umsókn um byggiloyvi til neyst á matr. nr. B dagf. 6/3-2021
>
> Arbeiðið at viðgera byggiumsóknir til neyst hevur tíverri drigið út, men nú er gongd komin á málið og væntandi verða allar umsóknir, sum liggja í bíðistøðu, viðgjørdar og vónandi avgreiddar á viðkomandi nevndarfundi í viku 7 og viku 12, har ímillum umsókn tín um byggiloyvi til neyst á matr. nr. B.
>
> ...
>
> Tú frættir aftur tá umsókn tín er viðgjørd vísandi til tíðarmálið omanfyri."

Tann 29. mars 2023 ( t.e. í viku 13) sendi klagarin ein fyrispurning til Runavíkar kommunu, um málið.

Runavíkar kommuna svaraði klagaranum við telduposti sama dag við soljóðandi telduposti:

> "...

> Orsaka av sjúku og feriu, so kom málið tíverri ikki fyri í viku 12, men verður tikið upp á næsta nevndarfundi, sum verður í viku 17.”

Tann 28. apríl 2023, fríggjadag í viku 17, sendi klagarin ein fyrispurning til Runavíkar kommunu um mál sítt, sum skuldi koma fyri í viku 17.

Tann 3. mai 2023, miðskeiðis í viku 18, sendi klagarin enn ein fyrispurning til Runavíkar kommunu um mál sítt. Tá klagarin ikki hevði frætt frá Runavíkar kommunu sendi hann tann 7. mai 2023 klagu til umboðsmannin, sum er endurgivin fyrst í álitinum.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 8. mai 2023 varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Runavíkar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um málið, skjalayvirlit yvir málið og møgulig nýggj skjøl, sum vóru komin síðani hálvan februar 2023.

Tann 9. mai 2023 sendi Runavíkar kommuna móttøkuváttan og boðaði frá, at málið var skrásett og koyrt víðari til avgreiðslu.

Tann 2. juni 2023 sendi umboðsmaðurin áminning um málið til Runavíkar kommunu.

Tann 15. juni 2023 minti umboðsmaðurin Runavíkar kommunu á málið í telefonsamrøðu.

Tann 26. juni 2023 sendi umboðsmaðurin fráboðan til landsstýrismannin í kommunumálum um vantandi svar frá Runavíkar kommunu og bað hann taka neyðug stig til, at Runavíkar kommuna svaraði umboðsmanninum.

Í telduposti tann 29. juni 2023 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum og klagaranum soljóðandi skriv:

> “Vísandi til klagu frá A dagf. 8. mai 2023 í sambandi við umsókn hansara um byggiloyvi til neyst á matr. nr. B.
>
> Sagt skal verða frá, at Tekniska deild framhaldandi arbeiðir við málinum um reglur fyri neystabygging í teimum ymisku økjunum í kommununi og hevur avgreitt nakrar av umsóknunum, men komið er ikki á mál við at avgreiða allar umsóknirnar.
>
> Tað hevur tíverri drigið út at fáa øll viðurskifti í sambandi við ásetingar um m.a. brunaviðurskifti, kloakkviðurskifti, drekkivatnsviðurskifti v.m. uppá pláss, men arbeitt verður við at fáa allar umsóknirnar, sum kunnu lúka nevndu ásetingar, avgreiddar áðrenn ella beint eftir summarferiuna. “

Klagarin sendi sama dag soljóðandi viðmerkingar til umboðsmannin:

> “Hetta er sama skil sum var. Eg gevi einki fyri hendan arbeiðsmátan, sum kommunan ber seg við at svara. Eg veit ikki, hvat eg skal gera, nú fór hettar árið aftur. “

Tann 1. juli 2023 sendi klagarin soljóðandi viðmerkingar til umboðsmannin:

> “...Í svari segði ...(Runavíkar kommuna, mín viðm.) at orsaka av sjúku og feriu kom málið ikki fyri í viku 12, men verður tikið uppaftur á næsta nevndarfundi í viku 17. Bleiv skuffaður, ein lygn, einki er hent. Havi spurt meg fyri hjá einum bygdaráðslimi, ..., og segði hann, at tað blivu eingi neystaloyvir útskrivaði, sum ...(Runavíkar kommuna, mín viðm.) sigur.
>
> So aftur ein lygn har. Her standi eg. Skal hava bygt nú í 2 ár. Onki er hent. Prísur og alt annað er stikað upp í loft, síðani eg søkti fyrstu ferð. So tey áttu at betalt ein part av framferðini. Hetta er fyri mær ein syrgilig støða at koma í. Onkur mátti í hasum býráðnum haft ringa samvitsku, men fáa kanska einki gjørt? Er einki við at sekta við bót ella dagbótum, tá man ikki viðger mál?...”

Tann 5. juli 2023 sendi umboðsmaðurin viðmerkingarnar frá klagaranum til Runavíkar kommunu til kunningar og møguligar viðmerkingar. Samstundis boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um viðgerðartíðina hjá Runavíkar kommunu og vantandi kunning til klagaran um málsviðgerðina av umbøn klagarans um byggiloyvi til neyst.

Í fyrisitingarlógini eru ongar almennar reglur um málsviðgerðartíðina hjá myndugleikunum, men sambært góðum fyrisitingarsiði skulu mál altíð viðgerast innan rímiliga tíð, og viðgerðin má ikki gerast ov langdrigin.

Í hesum máli hevði klagarin latið Runavíkar kommunu umsókn um loyvi til at byggja neyst tann 6. mars 2021, og hóast fleiri áminningar og fyrispurningar hevði klagarin í juli 2023 ikki fingið eina avgerð.

Løgtingsins umboðsmaður fekk í mai 2022 klagu um málið og lat í tí sambandi úr hondum álit í september 2022.

Í álitinum gav umboðsmaðurin Runavíkar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av umsóknunum um byggiloyvi til neyst. Umboðsmaðurin vísti ítøkiliga á, at kommunan hevði skyldu at viðgera umsóknir um byggiloyvi eftir galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð. Umboðsmaðurin vísti á, at tað ikki var í samsvari við galdandi lóggávu, at Runavíkar kommuna

setti øll mál um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu uttan viðgerð vegna ætlanir at broyta byggisamtyktina.

Víst varð á, at hevur ein kommuna ætlanir í umbúnaði, tó uttan at hesar eru komnar somikið ávegis, at broytingar eru lagdar alment fram, hevur hon, sambært § 8 í býarskipanarlógini, møguleika at biðja landsstýrið um at nokta fyri nýtslu, ið verður hildin at vera ósamsvarandi. Hesa mannagongd hevði Runavíkar kommunu ikki nýtt, tá ið umsóknirnar vórðu settar í bíðistøðu.

Nú, nærum 1 ár eftir álvarsligu átaluna, hevði Runavíkar kommuna ikki enn avgreitt umsókn klagarans um byggiloyvi til neyst, hóast klagarin hevði fingið boð um, at málið fór at vera viðgjørt í viku 7 ella viku 12, og síðani í viku 17.

Síðst í viku 17 og í viku 18 sendi klagarin fyrispurningar um umsókn sína til Runavíkar kommunu uttan at fáa svar. Klagarin sendi síðani síðst í viku 18 klagu til umboðsmannin um vantandi svar og kunning frá Runavíkar kommunu.

Undir vanligum umstøðum, meti eg, at tað ikki vildi verið átaluvert, at Runavíkar kommuna ikki svaraði fyrispurningin frá klagaranum beinanvegin í viku 17 ella 18.
Í hesum føri haldi eg tó, at Runavíkar kommuna beinanvegin átti at kunna klagaran um støðuna við umsókn hansara, tá hugsað verður um drúgvu málsviðgerðartíðina av málinum og ta grundaðu væntan, sum klagarin hevði um viðgerð av málinum í viku 17.

Eg haldi tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna, hóast álvarsliga átalu í september 2022, enn í juni 2023 ikki hevði viðgjørt umsókn klagarans um byggiloyvi til neyst, og at Runavíkar kommuna í slíkari støðu ikki gjørdi meira fyri at kunna klagaran um støðuna við máli hansara, og nær avgerð kundi væntast. Hetta er als ikki nøktandi málsviðgerð, og meti eg hetta verða sera álvarsamt vansketni í viðgerðini.

Eg fari tí at geva Runavíkar kommunu eina sera álvarsliga átalu fyri hetta og fari samsvarandi umboðsmanslógini § 10 at senda fráboðan um málið til Løgtingið, løgmann og landsstýrismannin í kommunumálum.

Eg fari at biðja Runavíkar kommunu lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður